Gleðilig jól og eitt eydnuberandi nýggjár



*Umhvørvisstovan er stongd millum jól og nýggjár.*

SENDISTOVAN

Í summar sá Umhvørvisstovan dagsins ljós.

Vit taka okkum av umhvørvisvernd, røkt av náttúruni, matrikulfyrisiting og tinglýsing. Vit skráseta, ráðgeva og granska. Vit umsita fólkaeftirlit, skipa fyri framsýningum og mangt, mangt annað.

Vit gleða okkum til eitt spennandi ár og vilja takka viðskiftafólki fyri tað brátt farna. Meira verður at frætta frá okkum í nýggja árinum.

umhvørvisstovan

www.us.fo



Atlants Tøkni

# forritari.kom

**Senta søkir eftir forritara til menningardeildina.**

*Saknar tú spennandi uppgávur? Kundi tú hugsað tær betri møguleikar fyri persónligari menning? Vilt tú geva tíni passión fyri telduyrkinum rásarúm? So ert tú vælkomin í SENTA.*

**Arbeiðsøkið**
Í starvinum fert tú at menna skipanir við nýggjastu tøkni og amboðum saman við dugnaligastu starvsfólkum í vinnuni, umframt at tú fert at gera serskipanir eftir ynskjum hjá breiða kundaskara okkara.

**Tú**
Tú hevur útbúgving í KT (bachelor, kanditatur ella líknandi) og helst eisini royndir á økinum. Ert tú um at gera útbúgving tína lidna, hoyra vit eisini fegin frá tær. Tað er ein fyrimunur, um tú hevur arbeitt við .Net, Java og/ella Oracle.

**Vit bjóða**
Vit bjóða tær eitt gott starv í væl skipaðum umstøðum, har tú saman við dugnaligum starvsfeløgum fært høvi at ávirka innihaldið í tínum arbeiðsdegi. Løn og setanartreytir sambært førleikum og avtalu.

**Forvitin?**
Vilt tú vita meira um starvið, ert tú vælkomin seta teg í samband við Høgna Carlsson á tlf. 21 02 91 ella hc@att.fo.

**Umsóknir**
Umsóknir skulu sendast til Senta, HR-Deildin, Postboks 109, 110 Tórshavn og skulu vera okkum í hendi áðrenn **7. januar 2008**.

Allar umsóknir verða viðgjørdar í trúnaði.

*Senta er samanrenningin av Com-Data, Farodane, og Atlants Tøkni og er ein framsøkin fyritøka, sum grundar virksemi sítt á opinleika, áræði, førleika og passión. Vit vilja í øllum lutum útvega kundum okkara í Føroyum og uttanlands eina betri stýring og harvið ein størri vinning í gerandisdegnum, bæði fíggjarliga, tøkniliga og umsitingarliga.*

*Missiónin hjá Senta er at gera kunningar- og samskiftistøkni møguliga og lætt atkomuliga fyri øll, so at hon gerst ein jalig uppliving hjá brúkaranum og ein fyrimunur hjá virkjum at nýta.*

*Senta hevur deildir í Tórshavn, Saltangará og Klaksvík og veitir teldutøkni, KT-skipanir, ráðgeving og tøknitænastur til vinnulívið. Hjá Senta starvast uml. 70 fólk.*

SENDISTOVAN

NEMA

Senta er partur av NEMA, ið er største KT- og samskiftissamtak í Føroyum og veitir fullfíggjaðar tænastur innan KT, skrivstovuútgerð og samskifti.

SENTA®

BETRI STÝRING. STØRRI VINNING.